




Puntur nr.14

# Please, mind the gap

**Í sambandi við, at Sosialurin í hesi viku hevur vitjað bretska høvuðsstaðin, setur Torfinnur Jákupsson, ið er lesandi í London, í hesi síðstu greinini fokus á, hvussu tað er at ferðast í sjey milljóna ríka stórbýnum**

LONDON
*Torfinnur Jakupsson*
*jakupsson@gmail.com*

Hjá føroyingum kann ferðingin í einum stórbýi sum London møguliga tykjast ring at hava yvirlit á. Tó er ikki at stúra, ætlar tú tær at vitja bretska høvuðsstaðin. Almenna ferðingin í London er støðug og skjót, og er lættasti hátturin at ferðast (um tú ikki tekur taxabil) reyðu double-decker bussarnir ella undirgrundin.

At ferðast í London ikki so ringt, sum tað kann tykjast, hevur tú bert skil á tíðarætlanini. Steðgistøð til bussar og undirgrundin eru altíð tætt við.

Undirgrundin í London – ella tubin, sum Londoníbúgvar kalla hana – er skjótasti mátin at ferðast runt í London. Undirgrundin fevnir um 275 tokstøðir og gongur 408 km. runt um London. 63 av tokstøðunum ganga runt um sentrum í London. Tú ert sostatt altíð tætt við eina metrostøð.

Samlaða talið av ferðandi á tubuni hvørt ár er nú 976 milljónur, tvs. 2,7 milljónur ferðast í tubuni um dagin. Hvønn tíma fara uml. hálvt annað hundrað túsund fólk inn í undirgrundina. Annað, ið møguliga er áhugavert at vita, er, at miðalferðin á hvørjum toki er 33 km. um tíman, og longsta rullitrappan í undirgrundini er hon við Angel. Henda er 60 metur long.

Og reglan "mind the gap" verður bert spæld, tá tokini steðga við ein platform, sum ikki er nóg tætt við tokið. Henda regla er í dag vorðin at kalla slagorðið hjá undirgrundini í London.

Undirgrundin fevnir um tólv linjur, sum allar hava hvør sín lit á undirgrundskortinum. Tokini ganga antin eystureftir, vestureftir, norðureftir og suðureftir, og koyra øll við jøvnum millumbilum. Tað sama er galdandi við bussunum. Undirgrundin er opin frá kl. 05.30 til kl. 00.30 mánadag til leygardag, og sunnudagar frá kl. 07.30 til kl. 23.30. Fleiri bussar koyra tó døgnið runt. Tú kanst fáa tær eitt kort av allari undirgrundini á øllum tokstøðum, og hetta kostar onki. Royking er ikki loyvd í undirgrundini, hvørki á tokunum ella á tokstøðunum. Royking er heldur ikki loyvd á bussunum í London. Hetta er nokkso eyðsæð.

Kanska stuttligasti hátturin at ferðast runt í London er í víðagitnu reyðu double-decker bussunum, ið eru ein fastur táttur í býarmyndunum av bretska høvuðsstaðnum. D oubledecker bussar verða nýttir um alt Stóra Bretland, men hin kendasti er tann reyði London-bussurin, ið hevur upp til 80 setur og er um 11 metrar langur.

Double-decker bussarnir vórðu til í London, tí stórbýurin hevði tørv á einum ferðatóli, ið bar so mong fólk sum gjørligt uttan at gera brot á lógarásettu ferðslureglurnar um, hvussu langt eitt akfar skuldi vera. Double-decker bussurin hevur sostatt tvær hæddir. Men m.a. orsakað av trygdar- og heilsuávum eru omanfyrinevndu reglur nú broyttar.

Nú er avgjørt, at doubledecker bussarnir skulu skiftast út við longu harmonikubussarnar. Hetta er harmiligt frá mínum føroyska sjónarhorni. London eigur eisini at upplivast frá einum góðum, gomlum dupult-dekkara.




*Kendu reyðu double-decker bussarnir eru fastur táttur í býarmyndini av London. Á hesi mynd síggja vit skiltið "Mind the bombs" á síðuni av einum bussi sum dømi um, at bretar hava eitt svart, men gott skil fyri skemti*



*Hvønn dag ferðast um 2,7 milljónur fólk við undirgrundini í London. Onkutíð er sum vera man sum sild í tunnu, men tað kemur eisini av tí góðu orsøk, at undirgrundin er skjótasti hátturin at ferðast runt í London*




